Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Johan Dahl, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Landskassans samlaðu útreiðslur til gransking, menning og nýskapan

Spurningar:

1. Hvussu stórar vóru landskassans samlaðu útreiðslur/játtanir til gransking, menning og nýskapan í tíðarskeiðnum 2015-2023, býttar á almenna og vinnuliga gransking - málsøki, stovnar, endamál, verkætlanir o.a.?
2. Hvussu nógv ársverk er talan um í tíðarskeiðnum 2015-2023?
3. Hvussu stórar væntast landskassans samlaðu útreiðslur/játtanir til gransking, menning og nýskapan í tíðarskeiðnum 2024-2027 at verða, býttar á almenna og vinnuliga gransking - málsøki, stovnar, endamál, verkætlanir o.a.?
4. Hvussu nógv ársverk er talan um í tíðarskeiðnum 2024-2027?

Viðmerkingar:
Tað er alt meira vanligt, at nakrir almennir stovnar í Føroyum arbeiða við gransking, menning og nýskapan, sum fyri tað mesta verður fíggjað við pengum úr landskassanum og annars útlendskari fígging. Vit vita t.d., at grundgransking er nakað, sum bara stór og búskaparliga sterk lond taka sær av. Tí er viðkomandi at lýsa, hvat vit sum eitt lítið land granska innan fyri, og hvat tað kostar landinum o.a.

Tað, sum ynskist lýst í fyrispurninginum er eitt yvirlit yvir tær samlaðu útreiðslurnar ella játtanirnar, sum standa á løgtingsfíggjarlógini - ein uppgerð býtt á ymsu málsøkini, stovnar, endamál, verkætlanir o.a.

Tá vit brúka pengar og politiskt skulu raðfesta, vil spurningurin altíð vera, um vit alternativt kundu brúkt pengarnar til onnur endamál og skapt størri nyttuvirði fyri samfelag og vinnu. Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan hevur lagt upp til ein málsetning um at seta av 3% av BTÚ til gransking, menning og nýskapan, svarandi til millum 700 og 800 mió. kr. árliga. Hetta mál verður ásett, uttan at upplýst verður, hvussu nógv longu verður játtað til hesi endamál, og hvat fæst fyri pengarnar.

Tað er eftir hondini sera trupult politiskt, fyri ikki at siga ógjørligt, at gjøgnumskoða, hvussu nógvir almennir pengar í løtuni verða latnir úr landskassanum tilsamans til gransking, menning og nýskapan. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Víst skal vera á, at undirritaði í heyst setti landsstýrismanninum í barna- og útbúgvingarmálum ein § 52a fyrispurning um evnið.

Á Løgtingi, 26. januar 2024

Johan Dahl